Sosialurin



# Geva íslendingum hundraðtals føroyskar fløgur

**Tá Gissur Patursson fer til Íslands til AME tiltakið um vikuskiftið, hevur hann tvey kuffert við sær – proppað við fløgum við føroyskum tónleiki, sum er ein gáva til íslendingar**

TÓNLEIKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Hetta er eitt win-win projekt, sum skal gagna báðum pørtum. Vit merkja tað, at føroyingar hava undanvind í Íslandi, og vit føla, at tað ber til at vinna føroyskan tónleik fram á íslendska marknaðinum á henda hátt.

Soleiðis sigur Gissur Patursson, sum í hesum føri umboðar Framleiðslufelagið fyri føroyskan tónleik – t. e. føroyska Gramex-deildin, stuðlað av EIK og Expert.

Tey hava sett sær fyri at taka allan føroyskan tónleik við sær til Íslands at geva íslendskum miðlum. Tvey eintøk verða av hvørjari fløgu, eitt eintak í hvørjum kufferti. Annað kuffertið fær íslendska Ríkisútvarpið – og fer tað í felags savnið hjá RUV og Rás2, hitt verður latið onkrum øðrum – eftir nærri avtalu við heimildarfólk á staðnum, so tað gagnar á bestan hátt.

Gissur Patursson sigur, at tey higartil hava fingið samstarv við ymsar útgevarar um hetta, eitt nú Tutl, 3'aran/Expert, Evangelisku røddina og Pegasus. Hesi lata tvey eintøk av hvørjari útgávu.

- Men vit vilja fegin hava øll við og øll sløg av tónleiki, alt fra kvæðum og skjaldrum til rocktónleik, sigur Gissur Patursson.

Hann sigur, at íslendsku miðlarnir við hesum fáa allan føroyskan tónleik í søvn síni, og at tey tí uttan hóvasták kunnu leita tónleikin fram í databasum sínum.

- Eg havi so mangan verið úti fyri, at fólk í íslendskum miðlum ringja til mín fyri at fáa fatur á onkrum føroyskum lag. Nú verður lættari, tí nú hava tey beinleiðis atgongd til tónleikin.

Gissur Patursson sigur, at AME tiltakið um vikuskiftið er eitt upplagt høvi hjá føroyskum soleiðis at fáa allan føroyskan tónleik inn í íslendsku miðlarnar. Hann vísir eisini á, at vit hava nógv lættari atgongd til síkt í Íslandi, tí tað hevði valla borið til soleiðis at komið inn á danska ella svenska marknaðin við einum slíkum forholdsvís einføldum tiltaki.

Gissur Patursson heitir á øll, sum hava givið føroyskan tónleik út, um at venda sær til sín, so tey kunnu fáa tvey eintøk av øllum útgávunum við í savnið – so íslendskir miðlar fáa eitt so fullfiggjað savn av føroyskum tónleiki, sum til ber.



*Gissur Patursson hevur tikið stigið til hetta óvanliga tiltak at geva íslendingum allan tann føroyska tónleikin. – Eitt win-win projekt, sum gagnar báðum pørtum, sigur Gissur Patursson*




# Størri inntøkuvøkstur í Norðurlondum

MARKNAÐARRÁK

Norðurlendsk partabrøv hava staðið seg væl seinastu árini, og tey eru vorðin nakað bíligari enn onnur síðan lækkingina á partabrævamarknaðunum. Norðurlendsk virkir hava størri inntøkuvøkstur enn onnur virkir í til dømis Evropa. Kaupthing metir, at intøkuvøksturin hjá norðurlendskum virkjum framhaldandi fer at vera størri enn hjá øðrum. Hetta kemst m.a. av, at norðurlendsku virkini í størri mun enn onnur venda virkseminum hjá sær ímóti búskaparligu vakstrarøkjunum í Eysturevropa og Asia. Haraftrat standa Norðurlond sterk á fartelefon-marknaðinum, meðan tey í minni mun venda sær til fastnet, sum ikki tykist eins áhugavert.

### Dollarin undir størri trýst?

Dollarin, sum seinasta árið er viknaður til nú 5,58 krónur, kann lækka meira um USA kunnger vánalig búskapartøl ella um oljuprísurin hækkar. Higartil hevur áhugin fyri at fíggja amerikanska gjaldsjavnahallið verið góður, men um hann versnar og rentumunurin millum USA og Evropa minkar, er sannlíkt at dollarin kann vikna nakað. Kaupthing er ikki eins neiligt um amerikanska búskapin sum aðrir bankar, hóast ídnaðarálitini eru lækkaði. Við hækkandi prísvøkstri og einum sunnum arbeiðsmarknaði meta vit, at útlitini til fleri rentulækkingar í USA eru minni enn marknaðarsemjan. Tískil vænta vit ikki líka stóra lækking í dollaranum næstu 6 mánaðirnar sum marknaðurin annars.

### Lánsbrævarentur hækkaðar

Lánsbrævamarknaðurin misti góða stevið í farnu viku, og lækkaði eitt sindur. 10-ára rentan hækkaði 0,10% til 4,04%. Partabrøv halda á at hækka, og meðan tað stendur við, eru útlit fyri at renturnar eisini hækka.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna verða eyguni framvegis havd við gongdini á partabrævamarknaðinum. Serliga verður USA í andgletti, eftirsum gongdin síðan korrektiónina hevur verið serliga góð har, og tað eru rentupolitikkur o.a. haðani, ið eru á breddanum í løtuni.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 558,87 | -0,2% |
| JPY | 4,73 | -0,7% |
| GBP | 1.100,61 | 1,1% |
| NOK | 91,83 | 0,6% |
| SEK | 80,09 | -0,1% |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,53 | -0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 130,61 | 3,6% |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** |
| Atlantic Petroleum | 621,00 | 0,6% |
| KB Trygg Eurostoxx | 107,70 | 0,8% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*